# Lisbeth Petersen 70 ár

Fríggjadagin 27. februar verður móttøka á Dimmalætting í sambandi við at Lisbeth L. Petersen fyllir 70 ár leygardagin 28. februar.

Lisbeth er fyrrverandi býar- og landspolitikari og fólkatingslimur. Hon er fødd og uppvaksin í Havn. Realprógv tók hon í 1955 og studentsprógv á Bagsværd Kostskole og Gymnasium í 1958.

Hon hevur annars arbeitt sum projektskrivari á Føroya Fornminnissavni.

Lisbeth kom fyrstu ferð á ting í 1990 og var formaður í tingbólki Sambandsfloksins frá 2001-2004. Eftir valið 20. januar 2004 bleiv hon limur í fíggjarnevndini og trivnaðarnevndini. Lisbeth stillaði ikki uppaftur til løgtingavalið í 2008.

Lisbeth var starvsstjórnarlimur í Sambandsflokkinum frá 1980-90 og floksskrivari frá 1982-87, nevndarlimur í „Føroya Væl“ - valfelag Sambandsfloksins – frá 1989-2000, og sum formaður frá 1997-99.



Hon var varalimur á Fólkatingi frá á heysti 1988, til hon bleiv vald í Fólkatingi í 2001, og hon sat á Fólkatingið valskeiðið 2001-2005, tá hon ikki stillaði upp aftur. Í 1995 bleiv hon kosin Riddari av Dannebrog.

Hon sat í Tórshavnar Býráð frá 1984- 2000 og sum býráðsformaður frá 1992-96. Eisini var hon næstformaður í Kvinnufelagssamskipan Føroya frá 1982-86.

Foreldrini hjá Lisbeth vóru Rachel, f. Fonsdal, ættað úr Vestmanna, og Georg Lindenskov Samuelsen, ættaður úr Fuglafirði.

Lisbeth var gift við Jákup Petersen, maskinmeistara, sum andaðist í 2001, 74 ára gamal. Jákup var sonur Elsu og Jóannes Petersen av Signabø. Børnini hjá teimum eru: Elsa, f. 1961, og Georg, f. 1967. Ommubørnini hjá Lisbeth eru fimm í tali.

Móttøkan á Dimmalætting verður fríggjadagin frá kl. 15-17.

Statoilstøðin á Argjum:

# Opið aftur sum vanligt

Eftir at Statoilstøðin á Argjum hevur verið afturlatin eina tíð, er hon nú opin aftur.

Tað er Statoil Føroyar sum leiga støðina og reka hana sjálvir. Hans Waag, sølu- og marknaðarleiðari hjá Statoil, sigur, at síðan støðin læt aftur, hava teir kent tað, sum tað er ein stórur tørvur á eini slíkari støð á Argjum, har nógv fólk búgva.

Støðin hevur alt tað, sum aðrar støðir hjá Statoil í Føroyum hava. Umframt oljuog bensinsølu er handil við bæði kolonial- og kioskvørum, frukt, bakaravørum og fastfood.

*mg*



*Hanus S. Mikkelsen og Elsa Hansen til arbeiðis á Statoilstøðini*

*Myndir: Magnus Gunnarsson*



*Fruktmarknaður við fleiri góðum tilboðum*



*Statoilstøðin á Argjum*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jógvan Pól Johan Egholm**, vanliga nevndur Jógvan Páll, andaðist í Ålborg, mánadagin 23. februar, 39 ára gamal.

Kistan við **Árna Debes** fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsið fríggjadagin klokkan 17 í Vágs kirkju. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju leygardagin kl. 13. Tey ið vilja minnast Árna kunnu lata eina peningagávu, konto í suðuroyar sparikassa.

Kistan við **Pouline Kathrine Nolsøe Hansen, Tórshavn**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið 26. februar kl. 18.Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin 27. februar kl. 14.

**Jona Joensen**, fyrrverandi sjúkrasystir, ættað út Tórshavn, andaðist á Eldrasambýlinum Oman Hoydalar, týsdagin 90 ára gomul.

†

Kistan við elskaðu dóttur og systur okkara

**Bryndis Unadóttir**

fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 27. febr. kl. 16.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 28. febr. kl. 12.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhanna, Uni og Pætur**

Tey, ið vilja Bryndis við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til gávugrunn Bryndisar, konta í Eik Banka (til børn og ung við diabetes)

**Dagurin**
**26. februar. Ingigerð.** Kanska navn á franskari prinsessu, Ingardis, ið vit annars einki vita um. Navnið hevur fingið norrønan form, ið merkir tann av guðinum Ing varda. Janus Djurhuus varð føddur hendan dagin í 1881.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

**90 ára føðingardagur**
Leygardagin 28. februar verður Andrias Nielsen í Sandavági 90 ár. Dagurin verður hildin í SÍF-húsinum frá kl. 17.

**75 ára føðingardagur**
Mánadagin 2. mars, verður Hannefía Poulsen. Klaksvík, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni á Sjómans heiminum leygardagin 28. febr. kl. 18.00.

**Prógv**
23. januar 2009 fekk Linda Klementsen, Húsavík, prógv sum Professionsbachelor í Ergoterapi frá University College Sjælland í Næstved.